LISA
Frágreiðing frá Rakel Helmsdal, umboð hjá Rithøvundafelagnum í LISA.

LISA hevur verið sera aktivt seinasta árið.
Arbeitt hevur verið við at gera LISA og soleiðis listafólkini sjónligari í samfelagnum. LISA hevur verið væl umboða í miðlunum og tykist í størri mun at gerast tilsipanardepil í almenna kjakinum og handfaring av listaøkinum sum heild.

Arbeiðið berur frukt og LISA fær so líðandi meira ávirkan á listaøkinum. LISA verður brúkt til ráðgeving og hevur í hesum árinum fingið umboð í tveimum nýggjum nevndum. Listasavninum hjá Bank Nordik og Listaflog hjá Altantsflogi. Hetta afturat dómsnevndini hjá Rit & Rák, stýrið fyri ítróttarháskúlan í Suðri og stýrinum fyri Listaleypin, sum komu í fjørð og fyrraárið.

Tvey stór tiltøk mugu nevnast.
Eina er stóra ráðstevnan um listapolitikk í Føroyum, sum LISA skipaði fyri 28. og 29. oktobur 2016 í Sjónleikarhúsinum í Havn. Listafólkini orðaðu Lista Magna Carta Føroya. Evnið var Listapolitikkur Føroya. Fyri at listin skal standa so sterk sum gjørligt, so er tað er neyðugt at vit í Føroyum hugsa um og seta orð á hvat ein góður listapolitikkur er. Hvussu sær ein listapoltikkur, sum bæði er góður fyri listina og listafólkini út? LISA ynskir at útmarka listapolitikkin í mun til almennan mentannarpolitik. Starvsnevndin ynskir at fáa sett á breddan eina samrøðu um listapoltik har yrksilistafólkini koma til orða.

Hitt er livikorskanningin, sum LISA gjørdi LISA í heyst millum øll føroysk listafólk úti og heima. Ætlanin er at fara víðari við hesum og gera eina enn størri kanning. Henda fyrsta kanningin hevði greið úrslit ið vísa at føroysku yrkislistafólkini hava eina meðalinntøku, ið er langt undir tað aðrir samfelagbólkar hava. Tey hava ikki eftirlønir, ið tey kunna liva av. Tey ið arbeiða við list fulla tíð eru merkt av strongd. Hetta eru alarmerandi tøl, ið eiga at verða tikin í álvara av mynduleikunum og okkum sjálvum.

Fleiri onnur mál hava verið í árinum, og tað fer at bera til at lesa ársfrágreiðingina í heilum líki eftir eykaaðalfundin fyrst í apríl.